## William Heinesen 108 ár

William Heinesen hevði í dag verið 108 ár. Hann var føddur í Havn 15. januar 1900, og doyði 12. marts 1991. Hann var ein av kendastu føroysku listamonnunum, hann fekst bæði við at skriva, mála, klippa og komponera. Hann skrivaði á donskum, hóst hann livdi nærum alt lívið í Føroyum. Bert nøkur fá ár var hann í Danmark saman við vinmanninum Jørgen Frantz Jacobsen. Men av tí, at mamman var donsk, var William Heinesen uppvaksin við donskum. Hansara størsti íblástur kom frá einum virknum og livandi handilshúsi, tí tey vóru virkin handilsfólk í Havn. Hann var sostatt bæði ávirkaður av borgarliga lívinum, og –ígjøgnum mammuna- eisini av listarliga umhvørvinum. Mótsetningurin ímillum hesi bæði er ein reyður tráður í hansara bókmentum. William Heinesen gav út 7 yrkingasøvn, 7 stuttsøgusøvn og 7 skaldsøgur. Kendasta bókin er helst ”De fortabte spillemænd, sum á føroyskum eitur Glataðu spælimenninir. William Heinesen er týddur til 19 mál.



## Allah bert fyri muslimar

Allah merkir Gud á arabiskum. Men tað leggja myndugleikarnir í Malaysia eftir øllum at døma einki í. Nú er tað nevniliga bannað øllum kristnum, hindu’um, buddhistum og øðrum religiøsum minnilutabólkum at nýta orðið Allah í teirra trúarlívi. Allah skal bert nýtast til tey 60% av fólkinum, sum viðurkenna Islam. Hetta mátti ein blaðstjóri sanna, tá hann nevndi Allah í einum kristnum samanhangi. Úrslitið var, at avísin misti prentloyvi. Tað veit tíðindastovan Reuters.



*Tað er serliga matvøruprísirnir, sum skapa prísvøksturin*

*Tilvildarlig mynd*

# Munandi størri prísvøkstur í 2007 enn árið fyri

**Frá 2006 til 2007 vaks miðalbrúkaraprístalið 3,6 prosent. Hetta er væl størri ársmiðal prísvøkstur enn frá 2005 til 2006, tá vøksturin var 1,5 prosent.**

PRÍSVØKSTUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Munurin stavar serliga frá hækkandi matvøruprísum og vaksandi býlisútreiðslum seinastu ársfjórðingarnar.

Frá triðja ársfjórðingi til fjórða ársfjórðing 2007 vaks brúkaraprístalið 1,9 prosent. Og seinasta árið, frá fjórða ársfjórðingi 2006 til fjórða ársfjórðing 2007, vaks brúkaraprístalið 5,5 prosent.

Ársmiðal prístal javnar út tilvildarligar prísbroytingar í einstøkum ársfjórðingum við at samanbera miðalprístalið fýra teir seinastu ársfjórðingarnar við miðalprístalið undanfarnu fýra ársfjórðingarnar. Til dømis fýra ársfjórðingar í 2007 við fýra ársfjórðingar í 2006.

Frá 2006 til 2007 vaks miðalbrúkaraprístalið 3,6 prosent. Tað er í mesta mun rentuhækkingar og dýrkandi matvørur, sum hava togað ársmiðal prísvøksturin upp.

Eftir stóra rentufallið í 2006 er rentan hækkað somikið aftur í 2007, at vísitalið fyri rentuna á íbúðarlánum vísir ein ársmiðalvøkstur upp á góð 33 prosent frá 2006 til 2007. Fyri býli samanlagt hevur ársmiðalvøksturin verið 12 prosent.

Ársmiðalprísirnir á matvørum vóru í 2007 4,3 prosent hægri enn í 2006. Tað eru serliga prísirnir á breyði og kornvørum, kjøti, mjólk, osti, eggum og grønmeti, sum ávirka matvøruprístalið uppeftir.

### Prísvøkstur 5,5%

Árligi prísvøksturin mátar prísbroytingina millum ein ársfjórðing eitt árið og sama ársfjórðing árið fyri.

Fjórða ársfjórðing 2007 vóru brúkaraprísirnir í miðal 5,5 prosent hægri enn sama ársfjórðing í 2006. Hetta er størsti árligi prístalsvøkstur síðan 1993.

Allar býlisútreiðslur eru vaksnar, og samanlagt hevur prísvøksturin fyri býli verið 17,1 prosent frá fjórða ársfjórðingi í 2006 til fjórða ársfjórðing í 2007.

Eisini prísirnir í øllum matvørubólkum eru hækkaðir seinasta árið, samanlagt eru matvøruprísirnir farnir 6 prosent upp.

Tað er í stóran mun prísvøksturin seinasta ársfjórðingin í 2007, sum togar árliga prísvøksturin upp. Frá triðja ársfjórðingi til fjórða ársfjórðing 2007 hækkaði brúkaraprístalið 1,9 prosent, úr 110,2 til 112,3.

Seinasta ársfjórðingin er prístalið fyri býli farið 5,2 prosent upp, fyri matvørur 1,7 prosent og fyri flutning 1,5 prosent, skrivar Hagstova Føroya á heimasíðu síni.

# Lítil vøkstur í fólkatalinum



**Tann 1. desember 2007 var fólkatalið í Føroyum 48.405. Hetta eru 44 fleiri enn 1. november og 131 fleiri enn fyri einum ári síðani.**

FÓLKATAL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialirin.fo*

Hóast fólkatalið um ársskiftið ikki endaliga er uppgjørt enn, so bendir alt á, at tað verður hægri enn árið frammanundan, men kortini lægri enn 1. august, tá 48.564 búðu í Føroyum.

Av teimum 48.405, sum 1. desember búðu í Føroyum, vóru 23.226 konufólk og 25.179 mannfólk. Konufólkini vóru sostatt 1.953 færri, og í miðal vóru tað 108,4 mannfólk fyri hvørji 100 konufólk. Um vit hyggja at, hvussu kynslutfallið býtir seg upp á sýslur, síggja vit, at í øllum økjunum í landinum eru konufólkini færri enn mannfólkini, men nakað av muni er á. Upp á seg eru tey fækstu konufólkini í Sandoyar sýslu, har tað 1. desember vóru gott 117 mannfólk fyri hvørji 100 konufólk. Tað javnasta býtið var í høvuðstaðnum, har tað vóru gott 102 mannfólk fyri hvørji 100 konufólk. Restin av landinum liggur harímillum.

Sum í flestøllum framkomnum londum, veksur miðalaldurin í Føroyum alla tíðina so hvørt sum lutfalsliga fleiri koma longur upp í árini.

Tann fyrsta desember 2007 var miðalaldurin í Føroyum komin upp á 37,3 ár, og vøksturin í miðal síðani 2005 okkurt um 2 til 3 mánaðir um árið.

Men eisini aldursbýtið er ójavnt býtt um landið. Hægsti miðalaldurin er í Sandoyar og Suðuroyar sýslu, har hann nú er ávíkavist beint yvir og undir 40 ár Í høvuðstaðnum er miðalaldurin 36,6 ár og harvið tann lægsti í landinum.

Tað er áhugavert, at í Suðuroy hevur mestsum eingin vøkstur verið í miðalaldrinum seinastu tvey árini, og í Vágum stendur hann at kalla í stað, skrivar Hagstova Føroya á heimasíðu síni.